90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# PETUR HOLM



FAKTA **PETUR HOLM**

**Aldur:** 41
**Bústaður:** Hoyvík
**Starv:** Forstjóri í Smyril Line
**Familja:** Giftur við Fridu
**Børn:** Bjørt 12 ár, Teitur 11 ár, Áslakur 10 ár og Baldur 1 ár.

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

# Tora ikki at tosa um tað **veruliga** týdningarmikla

**Hvat er títt besta ferðaminni?**
Havi verið nógvar deiligar ferðir, men tann, sum stendur frískast í minninum var í mars í ár, tá øll familjan saman við vinfólki við familju sigldu og koyrdu í egnum bilum til Eysturríki at standa á skí. Tað var so lætt og avslappandi – sjálvt við smáum børnum.

**Hvat dámar tær betri – flúgva ella sigla?**
Eg elski at sigla – við egnum báti, við Norrønu ella við øðrum stórum og spennandi skipum. Tað er so róligt, avslappandi og romantiskt. Men tá eg havi skund dámar mær eisini at flúgva.

**Hvagar burdu føroyingar ferðast meira?**
Runt í Evropa við egnum bili. Stóru, spennadi høvuðsstaðirnar á meginlandinum. Flottu, heitu strendurnar longur suðri á sumri ella kavaklæddu vøkru alpurnar á vetri. Ávegis avgerð ein sjálvur hvat ein ynskir at uppliva.

**Hvat er tað strævnasta við at ferðast?**
At standa í kø og baksast við viðførið.

**Hvat ting er tú glaðast fyri?**
Mína iPhone 3G S 32GB og mínar nýggju Atomic D2 Race SL – Skífjalar

**Hvat ger teg bangnan?**
Tankin um at okkurt hendir við mínum nærmastu

**Hvussu nógv tjenar tú um mánaðin?**
Vit klára dagin og vegin og kanska eitt sindir afturat

**Hvar/nær hevði tú viljað verið ein fluga á vegginum?**
Tá konan er í bindiklubb og kanska eisini onkuntíð á Landsstýrisfundi

**Hvat er flóvisligt?**
At prumpa ímeðan eg liggi á búkinum og fái eina marglætis vøddamýking á eini marglætis vøddamýkingarstovu á einum marglætis gistingarhúsi

**Hvat ert tú gleðast yvir, við tíni egnu útsjónd?**
At eg enn havi hár á høvdinum

## Hvør núlivandi føroyingur er ordiliga kulur?
Gunnar Nielsen og Tróndur Patursson. Fantastiskir kemparar og einarar

**Hvørjir eru tínir størstu veikleikar?**
Tað er uttan iva mitt snarsinni

**Hvør er største avbjóðingin í Føroyum?**
At vit brúka so nógva tíð og næstan einans tora at tosa um tað sum ikki er veruliga týdningarmikið. »We do not face the brutal facts!« Og so, at vit eru so fáir føroyingar í Føroyum.

**Hvat ger teg illan?**
At spilla tíðina við tí, sum ikki hevur týdning og skapar framdrift. Óerligheit og slatur, og at Chelsea tapur. Men tað síðsta er so sjálvdan.

**Hvat ger teg glaðan?**
Tá tað gongur míni deiligu konu, mínum deiligu børnum og okkara nærmastu annars – familju og vinfólki – væl og tá alt gongur upp í eina hægri eind.

**Hvat hevur lívið lært teg?**
Fokuserað uppá tað sum hevur týdning, tak einki fyri givið og »Keep it simple«.